# Skaði fyri Sandoyartunnilin

**Meðan javnaðarmaðurin í Sandoynni, Gerhard Lognberg, varð móttikin sum hetja á keiini í Skopun, tá hann kom suður í gjár, var ongin at taka ímóti Páll á Reynatúgvu úr Tjóðveldinum, sum tekur undir við tunnilssemjuni, ið merkir, at tunnilsgerðin verður útsett. Tjóðveldistingmaðurin óttast nú fyri, at dreymurin um ein tunnil í oynna er longri burturi enn nakrantíð**

POLITIKKUR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Kílarnir í samgonguni um sokallaðu tunnilssemjuna tykjast bara at vaksa. Gerhard Lognberg hevur longu boðað frá, at hann hevur tikið seg úr samgonguni orsakað av eini semju, sum hann ikki kann taka undir við. Men sandoyartingmaðurin hjá Javnaðarflokkinum er ikki einasti trupulleikin, sum samgongan hevur at stríðast við.

Bergtóra Høgnadóttir Joensen úr Tjóðveldinum lat skilja á tingsins røðarapalli í gjár, at hon heldur ikki tekur undir við semjuni, men við øvugtum fortekni. Hon vil als ikki hava ein Sandoyartunnil – í øllum førum ikki enn. Hetta fekk floksfelagan, Páll á Reynatúgvu, at mótmæla, tí orsøkin til at hann tekur undir við uppskotinum er, at hann hevur fingið lyfti frá løgmanni um, at 16 tingfólk standa aftan fyri semjuna.

Sosialurin hevur spurt sandoyartingmannin, hvat liggur aftan fyri hansara útsagnir, og hvørja støðu hann hevur í málinum.

- Tunnilssemjan er tað samstarvsgrundarlagið, sum vit hava, og tí má fyrsta og fremsta uppgávan hjá einum samgonguleiðara vera at sameina øll sjónarmið við semjuni sum grundarlag. Missa vit semjuna á gólvið, so óttist eg fyri, at vit fáa eitt uppaftur verri úrslit, enn tað, semjan leggur upp til, sigur Páll á Reynatúgvu.

Hann vísir á, at um nakar í Tjóðveldinum (Bergtóra Høgnadóttir Joensen, blm.) ætlar sær at siga samstarvið upp, so gongur hann út frá, at løgmaður fær hetta fyrst at vita og boðar okkum øðrum frá. Páll á Reynatúgvu vil tó ikki gera viðmerkingar til sjónarmiðini, sum floksfelagin úr høvuðsstaðnum hevur um spurningin. Hann óttast fyri, at uttan verandi samgongu sum grundarlagi verður sera torført at fáa meiriluta fyri eini betri semju.

- Um vit hyggja at hinum flokkunum, so fór Sjálvstýrisflokkurin á val upp á at vera ímóti føstum sambandi í Sandoynna. Eisini sambandsfólk úttalaðu seg ímóti tunlinum, og so er bert Fólkaflokkurin eftir. Tí óttist eg stórliga fyri, at eftir tað sum hendi í gjár, so er støðan hjá okkum, sum ganga inn fyri tunlinum, munandi viknað, sigur Páll á Reynatúgvu.

### Mistak við einum valdømi

Tjóðveldistingmaðurin í Sandoynni er vónbrotin av, at tað sum hann kallar fyri persónliga profilering í fjølmiðlum og yvirfyri veljarunum, er farið at fylla so nógv í føroyskum politikki.

- Tað ber ikki til persónliga at profilera seg upp á so stór mál sum Skálafjarðartunnilin og Sandoyartunnilin. Eg føli, at eg havi gjørt alt í einum fyri meg sera truplum máli og eri framvegis til reiðar til tað. Tá so nógvir pengar skulu brúkast, sum til hesar ætlanirnar, so ber ikki til at koyra í sjálvdrátti, tí tá kemur tú ongan veg, sigur Páll á Reynatúgvu.

Hann vísir á mótsetningin í sjónarmiðunum hjá teimum, sum vildu hava eitt valdømi.

- Nú síggja vit tað beint øvugta, sum var ætlanin við at gera Føroyar til eitt valdømi. Parlamentarisman hevur tapt, síðani vit fingu tað. Hetta er ein bági fyri bæði flokkar og samgongu, tí tað fyrst og fremst snýr seg um at hava takið á fjølmiðlunum og veljarunum, ístaðin fyri at taka atlit fyri landinum. Júst tað øvugta, sum ætlanin var við einum valdømi, sigur Páll á Reynatúgvu.



*Ikki einans ósemja er millum Gerhard Lognberg og restina av Javnaðarflokkinum um Sandoyartunnilin. Eisini í Tjóðveldinum er djúp ósemja millum Páll á Reynatúgvu og Bergtóru Høgnadóttir Joensen um sokallaðu tunnilssemjuna*

*Savnsmynd*

# Bergtóra sigur nei til tunnil

**Politiska ósemjan um Sandoyartunlinum tykist bara vaksa. Gerhard Lognberg hevur longu vent samgonguni bakið, og nú er opið stríð í Tjóðveldinum millum Páll á Reynatúgvu og Bergtóru Høgnadóttir Joensen. Síðstnevnda gongur als ikki inn fyri sokallaðu tunnilssemjuna, sum hon heldur fast um ikki er nøkur semja, men bert eitt tilmæli, ið hon loyvir sær at vera ímóti**

POLITIKKUR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Stóra málið um Sandoyartunnilin snýr seg ikki einans um, at Gerhard Lognberg úr Javnaðarflokkinum hevur vent samgonguni bakið, men breiðir seg nú til hin stóra samgonguflokkin, Tjóðveldið. Her er opið stríð millum forkvinnuna í tingbólkinum, Bergtóru Høgnadóttir Joensen, og sandoyartingmannin, Páll á Reynatúgvu.

Í samrøðu við Sosialin sigur tingkvinnan, at talan als ikki er um nakra tunnilssemju, men um eitt tilmæli frá samgonguni, sum hon alla tíðina hevur verið ímóti.

- Tað passar ikki, at eg havi sagt meg taka undir við ætlanini. Eg havi bara sagt, at eg standi aftan fyri løgmann, og so mugu tilmælini ganga sína gongd, sigur Bergtóra Høgnadóttir Joensen.

Hon meinar ikki, at tað nakrantíð hevur verið meiriluti fyri semjuni ella tilmælinum, so hon kallar tað.

- Vit hava so nógv stór mál, ið liggja á láni, og sum pengar skulu brúkast til. Ti hevði eg ikki kunnað sæð meg sjálvan í eyguni, um eg tók undir við eini so stórari ætlan. Hetta er ein samvitskuspurningur. Eg haldi, tað hevur nógv størri skund at fáa ein altjóða flogvøll, tí Føroyar er ein størri útjaðari yvirfyri útheiminum, enn Sandoyggin er í Føroyum, sigur Bergtóra Høgnadóttir Joensen.

Í sambandi við infrakervið vísir hon á, at tað er ørt at brúka so nógvan pening til nýíløgur, samstundis sum tað mangla hundraðtals milliónir til viðlíkahald til tunlar og brýr.

- Hetta kann samanberast við eina familju, sum keypir ein dýran køk, meðan takið lekur í eyri og seyri, sigur tjóðveldiskvinnan.

- Eg ivist ikki í, at vit einaferð fáa ein Sandoyartunnil, men tað er ikki nakað, sum eg taki undir við skal raðfestast nú, sigur Bergtóra Høgnadóttir Joensen.



*Floksfelagarnir í Tjóðveldi, Bergtóra Høgnadóttir Joensen, og Páll á Reynatúgvu eru rúkandi ósamd um Sandoyartunnilin*

*Savnsmynd*

# Løgmaður kann ikki misbrúka sítt embæti

**-Tað er bara ein gongd leið nú, og tað er, at løgmaður leggur frá sær, so vit fáa eina virkisføra samgongu, sigur formaðurin í Fólkaflokkinum, Jørgen Niclasen**

POLITIKKUR
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

-Í veruleikanum er tann politiska støðan ógvuliga greið. Samgongan hevur mist sín meiriluta í Løgtinginum, og so eigur løgmaður at leggja frá sær.

Fólkaflokkurin stendur ikki upp á spring at sleppa upp í samgonguna, sum nú hevur mist meirilutan í Løgtinginum. Til tess eru partarnir alt ov ósamdir. Eitt nú kann Fólkaflokkurin ikki taka undir við skatta- og avgjaldspolitikkinum hjá samgonguni, so skal flokkurin í landsins stýri, má byrjast av nýggjum.

Jørgen Niclasen sigur, at tað eru tvinnir møguleikar. Annar er, at samgongan verður víðkað við Sjálvsstýrisflokkinum, sum kortini ikki er serliga sannlíkt út frá tí, sum teir báðir tingmenninir hjá flokkinum hava sagt. Hin møguleikin er so, at Jóannes Eidesgaard leggur frá sær.

### Má fara frá

Formaðurin í Fólkaflokkinum heldur ikki, at Jóannes Eidesgaard hevur annað í at velja enn at leggja frá sær. Hann vísir á, at løgmaður hevði møguleikan at halda fram við undanfarnu samgongu aftan á seinasta val, men at hann valdi ta núverandi ístaðin fyri. Tað valið hevur víst seg at vera skeivt, heldur Jørgen Niclasen.

-Vit hava sæð eina ósemju fyri og aðra eftir, og úrslitið er, at vit hava havt eina óarbeiðsføra samgongu síðani valið. Nú mugu vit fáa eina nýggja samgongu, sum kann arbeiða, sigur Jørgen Niclasen.

Hann heldur lítið um ætlan løgmans at halda fram við einum minnilutastýri:

-Jóannes Eidesgaard hevur víst, at hann kann ikki stýra einum meiriluta, og enn minni kann hann stýra einum minniluta, sigur fólkafloksformaðurin.

### Misálit kann koma

Tann nýggja parlamentariska støðan hevur reist spurningin um misálit á sitandi landsstýri, og tann tankin er ikki so fjarur hjá formanninum í Fólkaflokkinum.

-Jú, eitt uppskot um misálit kann saktans koma upp á tal, men tað nyttar sjálvandi ikki at koma vbið tí, uttan at ein hevur vissu fyri, at minst 17 atkvøða fyri tí, sigur Jørgen Niclasen. Hinvegin væntar hann ikki, at tað verður neyðugt við misáliti.

-Eg vænti, at løgmaður fer frá. Tað er mark fyri, hvat ein kann misbrúka løgmansembætið til, sigur formaðurin í Fólkaflokkinum.